# Hósdagur 10. februar

**Útvarp Føroya**

7.00 **Tíðindi**
7.03 **Morgunlestur** - Jóna Thomsen á Strondum lesur
7.15 **Barnaløtan** - Jonna og Katrin leggja til rættis
7.30 **Tíðindi**
7.35 **Góðan Morgun Føroyar** - Kári Olsen er vertur
8.00 **Tíðindi**
8.05 **Góðan Morgun Føroyar** (e) - Kári Olsen er vertur
9.00 **Tíðindi**
9.05 **Morgunlestur** (e) - Jóna Thomsen á Strondum lesur
9.15 **Dagsins tónar**
9.30 **Reportasja** (e) - Per Højgaard og Kári Durhuus leggja til rættis.
10.00 **Tíðindi**
10.05 **Fimleikaløtan** - Elna & Egga skipa fyri.
10.10 **Lurtararnir og vit** - Elis Poulsen stílar fyri
11.00 **Tíðindi**
11.01 **Úr líðum og fjøllum** (e) - Ferðafrásøgn frá árinum 1899 eftir danska búnaðarfrøðingin Peter Feilberg. Árni Dahl týddi. Sverri Egholm lesur. 9. og seinasti partur.
11.30 **Føroyskur dansur** (e)
12.00 **Veðurtíðindi**
12.02 **Middagstónleikur**
12.15 **Skráin og lýsingar**
12.20 **Tíðindini og ítróttur**
12.40 **Døgurðatónar**
13.00 **Tónatímin**
14.00 **Tíðindi**
14.01 **Fimmarin** (e)
15.00 **Tíðindi**
15.01 **Nýtt og gott gamalt** - Høgni Zachariasen velur løgini
16.00 **Tíðindi**
16.01 **Rokkstovan** - Rasmus Rasmussen stílar fyri
17.00 **Tíðindi**
17.05 **Geykn** - Jóhannes Miðskarð og Maria Abrahamsen stíla fyri
18.00 **Barnaløtan** (e) - Jonna og Katrin leggja til rættis
18.25 **Skráin og lýsingar**
18.30 **Tíðindini**
19.00 **Í grannalagnum** - Mildrið Jacobsen skipar fyri
19.30 **Harmonikutónar** - Flóvin Jacobsen stílar fyri
20.30 **Tornið á heimsins enda** - 12. partur av skaldsøgu eftir William Heinesen. Hans Thomsen týddi og las.
21.00 **Tíðindi**
21.05 **Vaglið** - Ginna Midjord og Bjarni Mohr leggja til rættis
23.00 **Tíðindi**

**Lindin**

13.00 **Lindin – Góðan dag - Dagsskrá**
13.15 **Okkara dagliga breyð**
13.30 **Tónleikur**
14.30 **Norðurlendskur tónleikur**
15.30 **Barnasending**
18.00 **Bønartænastan**
19.00 **Sjómanssendingin »Vitin«** (e)
20.00 **Barnasending** (e)
20.30 **Okkara dagliga breyð** (e) - **Lovsangur**
21.00 **Bønarlinjan** v/ ym. luttakarum

**Rás 2**

9.00 **Lættur tónleikur**
9.45 **Orðið** - Bíbliulestur v/Anju Hansen
10.00 **Kaffi** - Morgunsending við ymsum úr bløðunum, veðurlagnum, koyrilíkindum, matarskránni o.ø. - Sonne Smith leggur til rættis
11.00 **Mangt & Hvat** - Undirhaldssending - Martin Sømark leggur til rættis
12.00 **Tíðindi**
12.15 **Middagstónleikur**
13.00 **Húsamarknaður** (e) - Keyp og søla á marknaðinum í løtuni - Sonne Smith leggur til rættis
14.00 **Elvis Presley og Gospel** (e) (1. partur) - Heri Simonsen leggur til rættis
15.00 **Tíðindi**
15.15 **Tónleikur**
16.00 **Seinnapartur** - Løtt innsløg. Smátíðindi. Tónleikur
17.00 **Barnatímin** - Ein tími við søgum og sangum fyri børn. - Lissi og Oddbjørg leggja til rættis
18.00 **Tíðindi**
18.15 **Nátturðatónleikur**
19.00 **Highway 83** - Ungdómssending. Miðlabreytin. Tónleikur, ítróttur, spurnarkapping o.a. - 10. flokkar í Havn leggja til rættis
21.00 **Tíðindi**
21.15 **Tónleikur frá 90'unum**
22.00 **Jukebox** - Lurtarin velur løgini. Telefon. 359999, fax 359990 ella E-mail: ras2@post.olivant.fo
23.00 **Orðið** (e) Bíbliulestur v/Anju Hansen

**SvF**

18.30 **Øskufía** 6:26
19.00 **Krosskast** (e)
20.00 **Dagur og Vika við Grannum okkara**
20.50 **20. øld** 3:12 - ensk dokumentarrøð
21.45 **Krimitímin: Harri yvir heiðini** 1:3
22.35 **Ferðafrásøgn: Festivalar**
23.30 **South Park 12** - am. kult-teknirøð
23.50 **Liðugt**

**Eurosport**

7.30 **Cross-Country Skiing**
9.30 **Figure Skating**
11.00 **Motorsports**
11.30 **Luge**
12.00 **Snowboard**
12.30 **Figure Skating** - live
15.30 **Football** - live
17.30 **Alpine Skiing**
18.30 **Figure Skating** - live
21.15 **Football**
23.00 **Tennis**
0.30 **Close**

**TV3**

5.00 **Børne-hjørnet med Disney**
7.15 **TV-shop**
8.10 **Hvide Løgne**
8.35 **Alle tiders barnepige**
9.05 **Ricki Lake**
10.00 **Hun så et mord**
10.55 **Horton-sagaen**
11.45 **Horton-sagaen**
12.35 **Drew Carey**
13.05 **Sjov og Spas**
13.30 **Panter-tanter**
14.00 **Det lille hus på prærien**
14.55 **Interne affærer**
15.50 **Sjov og Spas**
16.20 **Ricki Lake**
17.15 **Dagens Nyheder på TV3**
17.30 **Alle tiders barnepige**
18.00 **Sabrina - skolens heks**
18.30 **Hvide Løgne**
19.00 **Efterlyst Special**
19.30 **Falsk sikkerhed**
21.40 **SexOrama**
22.10 **Alle tiders barnepige**
22.40 **Dagens Nyheder på TV3**
22.50 **Drew Carey**
23.15 **Vore værste år**
23.45 **I lyst og nød**
0.15 **Ti tommelfingre**
0.45 **Monty Pythons flyvende cirkus**
1.45 **Ellen**
1.15 **Caroline, karrieren og kærligheden**
2.10 **Hvide Løgne**
2.40 **Godnat**

**BBC World**

0.00 **World News – Weather**
0.30 **HARDtalk**
1.00 **News – Weather**
1.30 **Holiday**
2.00 **News – Weather**
2.30 **The Money Programme**
3.00 **News – Weather**
3.30 **Asia Today**
3.45 **World Business Report**
4.00 **News – Weather**
4.30 **HARDtalk**
5.00 **News – Weather**
5.30 **How Buildings learn: »The Low Road«** 2:6
6.00 **World News – Weather**
6.30 **Europe Direct**
7.00 **World News – Weather**
7.30 **HARDtalk**
8.00 **World News – Weather**
8.30 **The Money Programme**
9.00 **World News – Weather**
9.30 **HARDtalk**
10.00 **World News – Weather**
10.30 **Holiday**
11.00 **The World Today**
12.30 **The Money Programme**
13.00 **World News**
13.15 **World Business Report – Weather**
13.30 **The World Today**
14.30 **How Buildings learn: »The Low Road«** 2:6
15.00 **World News – Weather**
15.30 **HARDtalk**
16.00 **World News – Weather**
16.30 **The Money Programme**
17.00 **World News**
17.15 **World Business Report – Weather**
17.30 **Talking Movies**
18.00 **World News – Weather**
18.35 **World Business Report**
18.45 **World Sport**
19.00 **World News – Weather**
19.30 **HARDtalk**
20.00 **World News – Weather**
20.30 **Earth Report: »Europe on Air«**
21.00 **World News – Weather**
21.30 **World Business Report**
22.00 **World News**
22.30 **Europe Direct**
23.00 **World News – Weather**
23.30 **World Business Report**
23.45 **Asia Today**

**BBC Prime**

0.00 **TLZ: »Wheeler on America«**
1.00 **TLZ: »Experimenter«**
1.20 **TLZ: »Experimenter«**
1.40 **TLZ: »Experimenter«**
2.00 **TLZ: »Edison – The Invention of Invention«**
3.00 **TLZ: »Athens – Democracy for a Few«**
3.30 **TLZ: »Cultures of the Walkman«**
4.00 **TLZ: »Greek Language & People«**
4.30 **TLZ: »Greek Language & People«**
5.00 **TLZ: »Twenty Steps to better Management«**
5.30 **TLZ: »Twenty Starting Business English«**
6.00 **Jackanory: »A Wizard of Earthsea«**
6.15 **Playdays: »Playground Stop«**
6.35 **Get your own back**
7.00 **The Biz**
7.30 **Going for a Song**
7.55 **Style Challenge: »Land Girls«**
8.20 **Change that: »Glasgow«**
8.45 **Kilroy: »Noisy Neighbour«**
9.30 **EastEnders**
10.00 **Antiques Roadshow**
11.00 **TLZ: »Awash with Colour«**
11.30 **Ready, Steady, Cook**
12.00 **Going for a Song**
12.25 **Change that: »Glasgow«**
13.00 **Style Challenge: »Land Girls«**
13.30 **EastEnders**
14.00 **Ground Force: »Warwick«**
14.30 **Ready, Steady, Cook**
15.00 **Jackanory: »A Wizard of Earthsea«**
15.15 **Playdays: »Playground Stop«**
15.35 **Get your own back**
16.00 **Classic Top of the Pops**
16.30 **Keeping up Appearances**
17.00 **The Brittas Empire**
17.30 **The Antiques Show**
18.00 **EastEnders**
18.30 **Vets in Practice: »Moving on«**
19.00 **Dad Reprodadtion**
19.30 **Fawlty Towers: »The Germans«**
20.00 **Casualty: »Sins of the Mother«**
21.00 **Shooting Stars**
21.30 **John Session's likely Stories: »Handsome Ted had his Day«**
22.00 **Brazen Hussies**
23.25 **Songs of Praise**

***SvF – Hósdagur kl. 21.45:***

### *Krimitímin:*

## *Harri yvir heiðini 1:3*



Ensk krimirøð frá 1994

Stephen Whalby er meginpartin av tíðini á dapru Dartmoorheiðini, har hann ein dagin finnur líkið av eini ungari kvinnu. Stephen kemur undir illgruna um somu tíð, sum morðið fær traumatisk minni frá barndóminum fram í huga hansara. Og so hvørvur enn ein kvinna á heiðini.

Leikarar: Colin Firth, Robert Urquhart, Emma Croft.

Leikrit: Trevor Preston eftir skaldsøgu hjá Ruth Rendell.

Leikstjórn: Marc Evans.

***TV3 - Hósdagin kl. 18.00:***

## *Sabrina*



## *– skolens heks*

Amerikonsk ungdómssendirøð

Eftir at Sabrina nú tvær ferðir hevur snúkt seg út til skúlaball, hóast henni er noktað at fara, gera Hilda og Zelda av, at hon nú skal fáa sín lærupening. Tær gera tískil av, at lata sum um tær hava ætlanir um flyta hvør til sítt, og nú verður Sabrina noydd at velja, hvørjari hon heldur vil búgv hjá. Hetta er tó avgjørt ikki nakað lætt val.

***TV3 - Hósdagin kl. 19.30:***

## *Falsk sikkerhed*

Amerikanskur spenningsfilmur frá 1999

Fyrrverandi tænastumaðurin og alzheimersjúklingurin, Mace Sowell, ber alla tíðina ótta fyri, at hann verður offur fyri einum snigskjútta. Hann hevur broytt heim sítt til eina borg, sum er full av trygdarútgerð, tí hann er bangin fyri vitan síni um komandi forsetaavbjóðaran, Michalmore. Dótturin hjá Sowell er hugsar sjálvandi sítt, og hón hóttir við at gera hann ómyndugan, um hann ikki tekur ímóti tilboðum um hjálp frá serkønum. Hann noyðist tí at góðtaka hetta, og ein pleygari, ið nevnst Andi flytir inn til hansara. Hetta gerst byrjanin til eitt løgið vinarlag, men tá Mace greiður Andi frá vitan sínari, gerst ótti hansara brádliga til óhugnaligan veruleika.

***TV3 - Hósdagin kl. 19.00:***



## *Efterlyst special*

9. desember 1989 var hin 17 ára gamla studentaskúlanæmingurin, Marcela Guerreo Miles, á vitjan hjá nøkrum vinfólkum í Farum, norðan fyri Keypmannahavn. Eftir hetta skuldi hon til jólaball í Hvidovre, men hon kom tó ongantíð so langt. Dagin eftir fann løgreglan líkið av gentuni, sum bæði varð neyðtikin og kvald á einum byggiplássi. 10 ár eftir tilburðin, er málið framvegis ikki uppklárað. Í málinum spøkir ein ókendur knallertkoyrari framvegis, sum tosaði við gentuna og síðani játtaði at koyra hana. Er hetta drápsmaðurin, kennir hann drápsmannin ella royndi hann bert at gera sær

***TV3 - Hósdagin kl. 21.40:***



## *SexOrama*

Erotisk doukumentarsendirøð

SexOrama letur seg nú í lakk og leður, tá sendingin fer á vitjan hjá John og konu ansara, Marlene, sum skulu hava eitt sonevnt fetish-ball. Vit fylgja við fyrireikingunum til stóra kvøldið, og síggja millum annað, hvussu undirhaldið verður. Har er alt frá Gummitrælum og óhugnaligum spølum til forførandi og frekar fetish-framsýningar. Vertirnir fáa millum annað vitjan 51 ára gamla Leif, sum seinastu 15 árini hevur gjørt dreymir sínar til veruleika. Eisini verður fylgt, hvussu leikur fer, tá svarta náttarlívið fer í gongd, tí hvat er tað, sum fær vanligar danir til at lata seg í gasmaskur, gummistyvlar, lakk, leður og leinkir?





e-mail: jakup@sosialurin.fo
Ítróttur
Sosialurin - Box 76 - 110 Tórshavn - Tlf. 31 18 20 - Fax 31 47 20

ÍtróttarSosialurin kann sjálvsagt eisini lesast á alnetinum: www.sosialurin.fo

# Høvdu finaluna í tonkunum

*Tað var um reppið, at kyndilsmenn snávaðu í landskappingini, tá teir á útivølli skuldu royna seg móti kollfirðingum. Hetta var tó ikki nóg mikið hjá heimaliðnum, og tískil mugu vit framhaldandi bíða eftir ársins fyrstu sensatión*



*Petur Martin Johansen og hinir kollfirðingarnir megnaðu akkurát ikki at taka av møguleikanum, tá…*
***Mynd: Álvur Haraldsen***

JÁKUP MØRK

KÍF-Kyndil 25-26 (14-12)

Talan var helst ikki um mest áhugaverda dystin hetta kappingarárið, tá KÍF og Kyndil skuldu hittast í Vestmanna mikukvøldið.

Lága áskoðaratalið, 35 gjaldandi áskoðarar, bar eisini boð um hetta, men kortini var um reppið, at hesi gjørdust vitni til fyrstu rættuligu sensatiónina í árinum.

### Als ikki uppsettir

Kanska hevði onkur væntað, at einstøku kyndilsleikararnir vildu nýta hetta sum ein seinasta møguleika at vísa venjaranum, at teir áttu sítt sjálvskrivaða pláss á liðnum, sum skuldi byrja finaludystin leygardagin. Kanska kundi ein eisini verið bangin fyri, at kollfirðingar fóru at verða bankaðir ígjøgnum av hesi orsøk, men einki av hesum hendi.

Stutt og greitt tóktist tað soleiðis, at grønklæddu havnarmenninir hugsaðu nógv meira um finaludystin enn um frammanfyristandandi uppgávuna, og hetta vórðu teir eisini revsaðir fyri í fyrra hálvleiki.

Kollfirðingar fingu drigið ferðina á dystinum niður, har teir helst vildu hava hana at vera, og og hóast liðini skiftust um at hava leiðsluna, so kundi tað helst endað heilt galið, um Lars ikki tók somikið nógv, sum hann gjørdi.

Av og á hoyrdust onkur róp millum kyndilsleikararnar, tá teir royndu at øsa hvønn annan upp, men hetta varð ikki til meira enn rópini.

Kollfirðingar sótu ikki sjóvarfallið av sær, men royndi hinvegin av øllum at vinna sær eina hampuliga leiðslu. Teir komu eisini tvey mál fram um, men eftir at Sophus hevði nýtt eitt time-out, fekk Kyndil tó fatur á teimum aftur. Kollfirðingar vunnu sær tó leiðsluna enn einaferð, og hesu ferð helt hon til hálvleiks.

### Vaknaðu - og sovnaðu

Tá liðini komu á vøllin fyri at avgreiða seinastu 30 minuttirnar, var tað tó sum um, at Sophus hevði tosað við stórum bókstavum í hálvleikinum.

Verjan á kyndilsliðnum riggaði nú nógv betur, og álopini koyrdu við fullari ferð. Skjótt hevði Kyndil yvirhála kollfirðingarnar, og flestu áskoðararnir mundu halda, at nú var alt mest sum avgjørt.

Kyndilsleikararnir megnaðu tó enn einaferð at gera sama mistakið. Eftir at hava vunnið sær eina hampuliga leiðslu, fóru tankarnir aftur at leita til finaludystin leygardagin.

Sostatt fór ferðin enn eina ferð av dystinum, og spakuliga minkaði leiðslan, sum kyndilsmenn høvdu vunnið sær.

Kyndil megnaði tó at halda seg frammanfyri KÍF, og tá tríggir minuttir vóru eftir at leika, vóru trý mál á muni, og Kyndil átti brotskast. Jacob brendi tó brotskastið, og KÍF gjøfdi skjótt av. Tvey mál innan tveir minuttir gjørdu, at munurin minkaði niður í eitt mál, og tá Kyndil mistu bótlin rættuliga skjótt í næsta álopinum, var sensatiónin brádliga ikki ógjørlig.

Seinasta álopið hjá kollfirðingum vardi í nærum ein heilan minutt, men inn vildi bólturin ongantíð, og tá dysturin endiliga var lokin, var framvegis eitt mál á muni.

### Nærum og tó

Dysturin gjørdist sostatt enn eitt prógv um, at hóast styrkismunurin í deildini er rættuliga stórur, so eiga veikaru liðini ikki at undirmetast.

Ígjøgnum árið hava øll oddaliðini havt trupulleikar í nøkrum av »løttu« dystunum, men hinvegin hevur tað hvørja ferð eydnast at togað neyðuga sigurin heim. Onkur vildi kanska sagt, at hetta bert vísur, hvussu heppin oddaliðini eru, men hinvegin krevst eisini nakað av hepni, um tú skalt gera teg galdandi í oddinum.

Tað man tó eisini vera galdandi, at munurin millum liðini er somikið stórur, at hóast oddaliðini taka sær av løttum, so megnað tey altíð at seta eitt sindur meira á, fyri at sigurin kann tryggjast.

### Ikki tað sama

Lítið er at ivast í, at hugburðurin hjá kyndilsleikarunum verður nakað øðrvísi, tá farið verður á vøllin leygardagin. Teir hava í hvussu so er onga orsøk til at undirmeta Neistan á sama hátt, sum gjørt var mótvgis KÍF mikudagin.

Heldur ikki kann roknast við, at taktiski parturin av spælinum verður hin sami leygardagin. Í hvussu so tóktist verjuuppstillingin hjá Kyndli at miseydnast fullkomuliga, og ikki fyrr enn farið varð aftur til 6-0, fingu teir so dánt tamarhald á støðuni.

Hetta hongur tó sjálvsagt eisini saman við hugburðinum til dystin, og sum nevnt verður hesin helst øðrvísi, tá steypið stendur upp á spæl.

**Dysturin í tølum:**
**Málskjúttar:**
KÍF: Vagnur Johannesen 9, Petur Martin Johansen 7 (4), Finn H. Johannesen 3, Petur Martin Poulsen 3, Jákup Dam 2, Kristian Madsen 1
Kyndil: Jacob Jónsson 9 (3), Bjarni Wardum 5, Leivur Holm 4, Uni Wardum 2, Janus Einar Sørensen 2, Rúni Poulsen 1, Rein M. Petersen 1, Bárður Mikkelsen 1, Niels Viggo Niclasen 1
**Brotskøst:**
KÍF 4, Kyndil 5
**Útvísingar:**
KÍF 2, Kyndil 1
**Dómarar úr StÍF:**
Svend Olsen og Poli Hansen



*…Rúni Poulsen og liðfelagar hansara snorksvóvu*
***Mynd: Álvur Haraldsen***